


Starvið sum skrivstovufólk á Barnaverndarstovu Føroya verður at seta 1. des. 2005, ella sum tað hóskar til uppsagnarfreistina í einum verandi starvi.

Barnaverndarstova Føroya letur eftir ætlan upp skrivstovu tann 1. des. 2005 í R.C. Effersøesgøtu 30, 100 Tórshavn.

Skrivstovufólkið skal, saman við hinum starvsfólkunum á stovninum, vera við til at uppbyggja ein vælvirkandi tænastudepil fyri lokalu barnaverndarumsitingarnar í samsvari við ásetingarnar í barnaverndarlógini.

## FØRLEIKAKRØV

Skrivstovufólkið skal:
> duga føroyskt til fulnar, bæði í skrift og talu
> vera væl skipað og røkið
> duga at leggja arbeiðið til rættis og arbeiða sjálvstøðugt
> vera kundavinarligt og fyrikomandi
> duga væl at samskifta, eisini í telefon
> føra bókhald
> uppbyggja og halda eina vælvirkandi journalskipan
> hava góðan teldukunnleika

## SETANARVIÐURSKIFTI

Starvið er fyribils ætlað at vera hálva tíð seinrapart. Neyðugt er, at viðkomandi, sum settur verður, er smidligur og til reiðar at taka eitt eyka tak, tá hetta krevst.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

## UMSÓKN

Umsókn saman við avriti av prógvum v.m. verður at senda til:

Barnaverndarstovu Føroya
Lucas Debesargøta 6-8
Postboks 53
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 28. nov. 2005 kl. 12.00.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Onnu Dam, leiðara, á tlf. 51 90 82 ella ad@lawfirm.fo.



# UNGDÓMSSAMFELAGSMØTIR Í BETESDA Í KLAKSVÍK

## - vikuskiftið 25.- 27. november

**Fríggjakvøldið 25. november**
kl. 21.00: Opið hús

**Leygardagin 26. november**
kl. 15.00: Bíbliutími - evni: Trúgv og vísund
kl. 21.00: Opið hús

**Sunnudagin 27. november**
kl. 11.00: Minnismáltíð Harrans
kl. 17.00: Evangeliskt møti

Sosialurin 341800

-liga vælkomin
**BETESDA**

BTSF 1980

# MÓTTØKA 25

Í samband við at tað í ár eru liðin 25 ár síðan Borðtennissamband Føroya varð stovnað, vil B.T.S.F. hervið bjóða til almenna móttøku í Listaskálanum í Havn, Leygardagin 19/11 kl. 16-19.

Við ítróttarkvøðu
Borðtennissamband Føroya